Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

## Til privat vinnurekandi

### Innlatingarfreistir viðv. sjálvuppgávum o.ø.

Sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir viðvíkjandi árinum 2000 hjá privatum vinnurekandi við roknskaparskyldu skulu vera **Økisskrivstovunum** hjá Toll- og skattstovuni í hendi sum tilskilað niðanfyri:

| Føðingardagur: | Seinasti innlatingardagur: |
|---|---|
| 1/1 — 28/2 | 1/4-2001 |
| 1/3 — 30/4 | 1/5-2001 |
| 1/5 — 30/6 | 1/6-2001 |
| 1/7 — 31/8 | 1/7-2001 |
| 1/9 — 31/12 | 15/8-2001 |

Um báðir hjúnafelagar hava skyldu at føra roknskap, kunnu báðir lata inn sambært tí freist, sum er galdandi fyri tann hjúnafelagan, sum hevur tann seinna føðingardagin.

Sjálvuppgávan verður roknað at vera innlatin rættstundis, tá hon er fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella er latin í postin í seinasta lagi omanfyri nevnda innlatingardag. Fellur innlatingardagurin á ein leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrsta eftirfylgjandi gerandisdag.

**Ber til at leingja freistina?**
Tá serlig grund er til tess, kunnu Økisskrivstovurnar leingja freistina til 15. august 2001, treytað av at

- umsóknin er skrivlig
- umsóknin er send, áðrenn nevndu freistir eru farnar
- sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru innkomin

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**





Sosialurin


## Skeið í AUTODESK INVENTOR

**9.–11. apríl 2001**
**kl. 8.10–15.20**

Undirvíst verður í:
Uppbygging og nýtslu av Autodesk Inventor.

Skeiðleiðari:
Jacob Frederiksen, CDLight, Horsens.

Skeiðkostnaður:
kr. 3.500,- (skal gjaldast við tilmelding)

Stað:
1. fyrsta hædd í el-deildin, Smiðjugerð

Tilmelding:
áðrenn 23. mars 2001

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Boðað verður frá luttøku við at venda sær til skúlan á tlf 311957
(mánadag–fríggjadag, kl. 8–12 & 13–16)

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
Teldupostur: mb@tst.fo




Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

# DAGFØR TEG

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum

Sosialurin

# HALT SOSIALIN

## Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

- ☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
- ☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
- ☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin




STRANDFARASKIP LANDSINS



## LASTBILUR TIL SØLU

1lastbilur av merkinum MAN 8F L2 er til sølu.
Er skrásettur fyrstu ferð 09/95 og hevur koyrt 216.000 km.
Lastievnið er 4.000 kg. Síðst sýnaður 02/00.
Er útgjørdur við 1,5 t Z-lift og prosendingskassa við lúkum og alu-dørki.
Er í sera góðum standi.

**Áhugaði kunnu ringja til Strandfaraskip Landsins á tlf. 213061 ella 213046**






BýIN
- HVøNN HóSDAG



FØROYA LANDSSTÝRI

## Stjóri til Matrikulstovuna

Við hesum verður søkt eftir stjóra til Matrikulstovuna.

Matrikulstovan
Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálastýrinum.

Matrikulstovan skal, sambært lóg, hava fullfíggjaða skráseting av øllum føstum ognum í Føroyum - matrikulin, og vera før fyri at seta mark millum fastar ognir út frá skrásettum mørkum, matrikulkortum og málibløðum. Grundarlagið undir hesum er fikspunktnetið, sum stovnurin umsitur og røkir.

Matrikulstovan umsitur eisini altjóða netini í samstarvi við KMS (Kort- og Matrikelstyrelsen). Harumframt skal Matrikulstovan, sambært lóg, útinna tað arbeiði, henni verður álagt av útskiftingini í sambandi við broytingar til bata fyri jarðarbrúkið.

Starvið
Stjórin hevur ábyrgdina av at leiða, reka og menna stovnin, og skal fremja tær uppgávur og ætlanir, sum eru lagdar til Matrikulstovuna.

Førleiki
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú landinspektør, útskiftingarkandidatur, løgfrøðingur, verkfrøðingur ella tílíka útbúgving
- Leiðsluroyndir frá almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð samstarvsevni og mennandi leiðslustíl

Setanarviðurskifti
Talan er um tænastumannastarv 37. lønarflokki. Starvsheiti er stjóri, og tænastustaðurin er fyribils Matrikulstovan. Setanarøkið er Vinnumálastýrið og stovnar undir tí.

Umsókn
Umsókn við prógvum, starvsroyndum o.ø. verður send til:

Vinnumálastýrið
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal verða Vinnumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 26. mars 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, aðalstjóra í Vinnumálastýrinum, tel 35 60 60.

V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð






eyðun nolsøe & terji rasmussen
**eitt nummar... og seytjan onnur**

**1** eros **2** tú **3** nummar **4** 80'ini **5** lívið er okkara gáta **6** mítt land **7** ljóðmynd **8** dansa **9** handan mjørkan **10** tey dansa eins og skuggar **11** hvussu kann eg vita? **12** sjalusi **13** eg flýggi til tónleikin **14** maria **15** skuggar yvir peking **16** gerandislag **17** morgunflog **18** afrodite

3arin

SMS - tel 35 35 35 - fax 35 35 36 - e-mail: tryarin@post.olivant.fo